## DAGSINS MEINING

# Sjálvstýrisflokkur – blokkur og pensjón

Fyrrverandi landsstýriskona Sjálvstýrisfloksins hevur seinastu tíðina verið nógv frammi í miðlunum, nú hon hevur hótt við at taka sín stuðul til samgonguna aftur. Hon sigur seg vilja krevja av hinum samgonguflokkunum, at 30 mill. kr. (møguliga 50) verða settar av til hækkan av fólkapensjónini.

Hvussu ber tað til, at sama løgtingskvinna ikki tók málið eins álvarsliga, tá lækkingin av blokkinum varð samtyktur? Tað eru tað fleiri enn vit, ið spyrja. Sjálv sigur tingkvinnan, at Sjálvstýrisflokkurin vildi lækka blokkin við 300 mill. kr. soleiðis at einar 30-50 mill. kr. av blokkinum tá kundu farið til hækkan av fólkapensjónini.

Tað er ótrúliga ósmæðið fyri ikki at siga jánkasligt at koma við slíkari útmelding nú val er í nánd. Um løgtingskvinnan og flokkur hennara veruliga meintu nakað við tað tey nú gráta krokodillutár um, so høvdu tey sligið nevan í borðið, tá blokkurin varð lækkaður. Hví kravdi flokkurin ikki at taka undir við lækkingini av blokkinum, at treyt fyri at atkvøða fyri hesi lækking var, at pengar vórðu funnar til at hækka fólkapensjónina so ella so!

Helena Dam á Neystabø blæsir og hevur mjøl í munninum um somu tíð. Tað kann man bara ikki. Tú vekir ikki álit millum veljararnar, um tú fyrst stendur á tingsins røðarapalli og verjir eina risastóra skerjing av blokkinum, sum m.a. er farin til fólkapensjón, fyri síðani at gráta yvir, at pengar nú ikki eru til somu fólkapensjón. Við hesum hevur tingkvinnan givið sær sjálvum og sínum flokki ein so dyggan frammaná, at hetta fer at kosta dýrt til valið.

Sjálvstýrisflokkurin hevur altíð viljað verið tann, ið byggir brýr millum blokkarnar í føroyskum politikki, hann, sum fær tingini at koyra. Í hesi samgongu hevur hann púra onga ávirkan havt, bara góðtikið alt tað hinir hava sagt og kravt. Hví tryggjaði hann sær ikki pensjónshækkingina, áðrenn blokkurin varð avhøvdaður. Tað eru nógvir veljarar hjá Sjálvstýrisflokkinum, sum á ongan hátt taka undir við tí ovurstóru skerjing av blokkinum, sum teirra egni flokkurin hevur verið við til at góðtaka. Tað má tí kennast teimum sera svárt og bakvent, tá tingkvinna teirra, nú valið nærkast, roynir at finna pengar til pensjónina – nakað, sum hon lættliga kundi fingið uppá pláss, tá blokkskerjingin var fyri. Tað er av alstórum týdningi fyri politikarar, sum vilja verða afturvaldir, at teir ikki minst undan einum vali hava sítt trúvirði á rætta stað. Tað kann ikki sigast um tað hjá umrøddu tingkvinnu í hesum so stóra og álvarsliga máli.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# FÒLKIÐ FYRST er reinur javnaðarpolitikkur

**Hans Jøgensen**



Á kjaksíðu Javnaðarfloksins www.javnadarflokkurin.fo er m.a. kjak um støðu Javnaðarfloksins til at seta fullveldi Føroya Fólks aftast í valskránna.

Undirritaði hevur viðgjørt henda spurning í einum svari niðanfyri.

Eri glaður um, at tú framvegis setir FÓLKIÐ FYRST. Tað er jú tann **reini javnaðarpolitikkurin.** Tú hevur rætt í, at lívskorini hjá fólkinum í alt ov stóran mun eru sett afturum. Egoisman í "góðu" tíðini fekk valdið á solidaritetinum. Tá kreppan kom, rakti hon fyrst fólkið "á gólvinum". Nú aftur fór at ganga tann rætta vegin fór fólkið afturum aftur til frama fyri sokallað fullveldi.

Tí gleðist eg saman við tær um, at Javnaðarflokkurin nú fyri fullum seglum setir lívskorini hjá fólkinum í fremstu røð.

Javnaðarflokkurin er ikki fullveldisflokkur, men Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum er eftir floksins hugsan ein frælsis- og sjálvstýrislóg út um ytstu mið. Halda føroyingar tað vera gagnligast at fara burturúr ríkisfelagsskapinum, so er tað lag á manni at gera tað sambært Sjálvstýrislóg Javnaðafloksins.

Eftir okkara hugsan er ríkisfelagsskapurin ikki ein spurningur um skiftistíð ella búskaparligar bindingar millum londini. Sjálvsagt skal pláss vera fyri ríkisfelagsskapinum, eisini aftaná, at Føroyar einsamallar eru førar búskaparliga at standa á egnum beinum. Hon leggur eisini upp til, at vit sjálvsagt gerast sjálvbjargin og við egnum midlum halda eitt sømuligt vælferðarstig.

Ríkisfelagsskapurin skal grundast á solidaritet millum tvey fólk, tvey lond, sum í felagsskapi verja fólkaræðið og vælferðina hjá tí einstaka borgaranum.

Mín hugsan er, at við Sjálvstýrislógini sum grundarlag fer tað at vera ein fyrimunur at halda fram í sama ríki, tí tað eru øki, har felagsskapurin er sterkari enn sjálvdrátturin. Eitt dømi eru avleiðingarnar av syndarligu hendingunum í New York og álopunum á Afghanistan. Hetta rakar eisini okkum beinleiðis, tí tryggingarkrøvini til Atlantsflog gjørdust so stór, at okkara lítla samfelag orkar ikki einsamalt at lyfta hesa byrði.

Okkum nýtist onga skiftistíð. Eina skiftistíð gera vit okkum sjálvi. Tað, sum eg haldi vera áhugavert við júst tí, tú nevnir um at seta fullveldi Føroya fólks í síðstu røð, er júst hetta, at vit vilja ikki lata dreymin hjá summum um fullveldi ganga fram um vælferðina hjá vanliga føroyinginum. Sum ein reinur javnaðarflokkur krevja vit, at alt fólkið í landinum fær tað gott, at lívsfrælsið verður sett fremst, tí fyrst tá kunnu vit tala um tjóðskaparligt frælsi.

# Myndaframsýning og grønir dagar í SMS

TÍÐINDASKRIV

Torgið í SMS er hesa vikuna karmur um trý fjølbroytt og spennandi tiltøk.

Nevnliga ein myndaframsýning við summarmyndum, eina framsýning um endurnýtslu og ein sølubás, har handilin Malaika í Vestmanna sýnir fram og selur.

Í summar hevur 3-arin í SMS skipa fyri myndakapping við heitinum Ársins Summarmynd. Hópin av summarmyndum eru sendar inn, og tað er ein partur av hesum myndum, ið verða sýndar fram á Torginum í SMS í hesum døgum.

Leygardagin kl. 13.00 verða vinnararnir í myndakappingini avdúkaðir á Torginum í SMS. Fyrsti vinnari fær eina flogferð til Danmarkar við Atlantsflogi, meðan nr. 2 og 3 vinna myndatól frá Minolta. Framsýningini hjá 3-arinum er opin alla vikuna.

**Grønir dagar**

Fríggjadagin 19. og leygardagin 20. oktobur skipa H71-stuðlar fyri grønum døgum á Torginum í SMS. Tað er Finnbogi Joensen í Vestmanna, sum hjálpir H71-stuðlum við framsýningini. Hann er sum frá er liðið vorðin ein kendur persónur, tá ið tað ræður um endurnýtslu, minni dálking og annað, sum er náttúruni at frama.

Tiltakið á Torginum er upplýsandi tiltak til almenningin, har stórur dentur verður lagdur á at gagnnýta rusk. Nógv rusk, sum í dag verður brent á brennistøðunum, er lívrunnið, og átti tí ikki at verðið brent.

- Slíkt tilfar hoyrir heima í jørðini, og tí eiga vit at nýta tað til sankutøð heldur enn at brenna tað, sigur Finnbogi.

Sýndir verða eitt nú sankutaðingarkassar og trevjaklútar. Trevjaklútarnir verða nýttir í dagligu reingerðini til tess at minka um reingeringarevnini, sum nýtt verða. Eisini verður nakað um grønar skúlar, sum Finnbogi millum annað hevur sett í verk í Vestmanna skúla. Og gjørt verður vart við, at vit sjálvi mugu gera okkurt fyri at minka um dálkingina.

Umframt framsýningina skipa tey fyri stórum tombolatiltaki við alskyns vinningum.

Framsýningin og tombolatiltakið hjá H71-stuðlum er opið fríggjadagin og leygardagin. Báðar dagar frá kl. 9.00.

**Handilin Malaika sølubás**

Fríggjadagin og leygardagin hevur handilin Malaika í Vestmanna sølubás á Torginum í SMS. Tað eru tey bæði Eina og Omar Mote, sum eiga handilin, ið selur afrikanska brúkslist og handverk. Omar er ættaður úr Kenya, og tí fara tey bæði sjálvi til heimlandið hjá honum at keypa inn, beinleiðis frá teimum, sum framleiða vørurnar. Tað er vert at leggja til merkis, at allir lutirnir eru hondgjørdir, og tí er einki eins. Hyggið framvið á Torginum í SMS hesar báðar dagarnar, og hyggið hvat Malaika hevur at bjóða av afrikonskum handverki.


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Djúpt frustreraður floksformaður

**Jóannes Eidesgaard**



Fyrsta, sum rann mær til hugs, tá eg las greinina hjá Høgna Hoydal í blaðnum ónsdagin við heitinum "Hví skulu danskir myndugleikar ráða í Føroyum?", var, at her má vera hent eitt mistak. Eitt mistak, tí hasa greinina kundi Høgni Hoydal ómøguligt hava skrivað. Høgni Hoydal, sum jú hevur givið síni egnu blaðgreinar út í bók, tí hann ivaleysur helt tær vera kraftfóður fyri føroysku fólkasálina, hann kann neyvan vera farin so eftir hæli.

Annars var næstseinasta greinin hjá Høgna, sum eg enn ikki havi gjørt viðmerkingar til, ein alfaðirlig áheitan á okkum aðrar politikkarar, greinskrivarar og fjølmiðlafólk, at vit við okkara orðavali syrgdu fyri at fáa eit meira virðiligt kjak. Minti meg mest um farisearan, sum takkaði Guði fyri, at hann ikki var sum tollarin, sum sat hinumegin og bardist við sína bøn.

Og so leggur hann út við at kalla meg sambandspolitikkara. Tað má eg so taka til mín, og tað má so Javnaðarflokkurin taka til sín bæði nú og í tíðini, sum kemur. Ikki serliga virðiligt, men mest av øllum einki álitisvekjandi.

Men greinin øll ber sín týðilig boðskap um ein djúpt frustreraðan floksformann, sum setti sær mál, og sum nú má viðurkenna, at úrslitið gjørdist soltið. Hesar frustratiónir skulu út onkursvegna, og onkur má standa fyri skotum, so hví ikki Javnaðarflokkurin og serliga floksformaðurin sum partur av andstøðuni?

So vóru tað spurningarnir. Níggju í tali, sum allir byrja við hví.

Lat meg fyrst øllum siga, at bæði Høgni Hoydal og Jóannes Eidesgaard noyðast at taka nakrar søguligar veruleikar sum veruleikar. Heimastýrislógin frá 1948 var samtykt bæði á Løgtingi og á Fólkatingi trý ár fyri, at eg var føddur og nøkur ár fleiri, áðrenn Høgna var føddur. Hvussu gjarna vit enn vilja, so sleppa vit ikki undan hesum politiska arvi. Og hvussu gjarna vit enn vilja, so byrjar søgan og veruleikin ikki við okkum.

Spurningur nr. 1 og nr. 2 um avgerðarrættin í Føroyum er ein og sami spurningur og tí sama svar: Her vil eg vísa til Sjálvstýrislógina, har sagt verður, at Javnaðarflokkurin ynskir, at Føroya Løgting sum umboð fyri Føroya fólk er hægsti myndugleiki í Føroyum. (síða 5 í bóklinginum um Sjálvstýrislógina). Hin vegin, so hava danir ikki størri avgerðarrætt í Føroyum, enn vit loyva teimum. Hesin avgerðarrættur minkar við yvirtøkum, men fellur heilt burtur við loysingini. Sitandi samgonga hevur havt møguleikan til bæði at fremja yvirtøkur og at taka loysingina, men hevur valt yvirtøkurnar.

Spurningur nr. 3 snýr seg um at viðurkenna føroyingar sum tjóð: Javnaðarflokkurin hevði í sínum broytingaruppskoti til samtyktina um Sjálvstýri Føroya Fólks soljóðandi orðing: "Ásannandi, at Føroya fólk er tjóð við ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætti, tekur Løgtingið undir við, at farið verður undir at fremja hesa sjálvstýrisætlan fyri restina av hesum valskeiðinum." Lat meg leggja afturat hesum svari, at Javnaðarflokkurin ongantíð hevur stuðlað donsku stjórnini í teirra uppfatan av okkum sum tjóð hvørki so ella so. Kundi skoytt uppí, at tað var Javnaðarflokkurin sum átti uppskotið, sum m.a. eisini Tjóðveldisflokkurin seinni tók undir, har vit ynsktu at føroyskt sjálvandi skuldi vera okkara tjóðarmál.

Spurningur nr. 4, um hví vit ikki sjálvir samskifta í altjóða viðurskiftum: Hetta er ein avleiðing av tí skipan, sum var gjørd í 1948, og sum eingin meiriluti enn hevur megnað at broytt. Skulu hesi viðurskifti broytast, so skulu Føroyar taka fullveldi. Hetta tilboðið hevur sitandi samgonga við Høgna Hoydal havt liggjandi á borðinum við 4 ára skiftistíð, men valdi landsstýrið í staðin Heimastýrislógina.

Spurningarnir nr. 5, 6 og 7 snúgva seg um familjurætt, uppihaldsloyvi og rætt-arskipanina: Eg eri púra samdur um, at hesi viðurskifti serliga familjurættur og uppihaldsloyvi fyri langari tíð síðan áttu at verið á føroyskum hondum. Hesi viðurskifti kundi eitt nú verið broytt í verandi valskeiði, um landsstýrið og samgongan høvdu ynskt tað. Og hesi málsøki, sum her verða nevnd, umsitur Høgni Hoydal øll sum landsstýrismaður.

Spurningur nr. 8 snýr seg um fólkakirkjuna: Hetta er eisini ein fylgja av skipanini frá 1948, men tað stendur okkum frítt at fremja yvirtøkuna, og sum eg skilji Óla Holm, landsstýrismann, so verður fólkakirkjan yvirtikin 1. jan. 2002, og so finna vit útav seinni, hvussu hon verður skipað. "Det grejer sig i sjøen -politikkur.".

Spurningur nr. 9 er um undirgrundina: Danskir myndugleikar hava als einki at skula at hava sagt um okkara undirgrund. Vit løggeva, og vit eiga tey møgulig virðir, ið har eru.Hetta er staðfest fleiri ferðir eisini av forsætismálaráðharranum. Eg kann kanska minna Høgna Hoydal á Fimmaran, har Halgir Winther Poulsen væl og virðiliga fekk sett alt hetta møsnið upp á pláss um, at danir kunnu taka undirgrundina aftur. At teir so hava ein yvirvaldsrætt, sum í hesum samanhanginum við undirgrundina er púra uttan praktiskan týdning er so ein onnur søk, sum bert kann broytast við fullveldinum. Men sum áður sagt, tann møguleikan tóku tit ikki av.

Hetta vóru so svarini, sum floksformaðurin ynskti at fáa. Neyvan verður frustratiónin minni av hesum.

# Giljanestiltakið

TÍÐINDASKRIV

*SÍF*

Stóra árliga Giljanestiltakið hjá Sandavágs Ítróttarfelag verður í Ítróttarhøllini á Giljanesi komandi sunnudag, tann 21. oktober. Byrjað verður klokkan 16.00.

Fyrst á skránni veðrur við mótasýning, sum byrjar , tá latið veður upp klokkan 16.00. Sjey ymiskir handlar, bæði úr Vágum og aðrastaðni fara at luttaka. Teir eru:

Stásið
Friendtex
John Poulsen
Shop In
Thomas Dam Ítróttur
Benneton/TM Junior
og
Brúðarlín.

Atgongumerki til mótasýningina kosta kr. 50,- fyri vaksin. Børn undir 14 ár sleppa ókeypis inn.

Annars er skráin tann, at:

Klokkan 17.00 byrjar mat- og køkutombola.

Klokkan 17.30 byrjar stóra eydnuhjólið, har vinningar eru nógvir og góðir. T.d. Keypmansdiskur, lútað reol, livandi lomb, saltfiskur, feskt kjøt og mangt annað.

Klokkan 19.00 undirhalda Hans Ravnsfjall og Tummas Gudmundsen við góðum livandi sangi og tónleiki.

Myndaframsýning við gomlum og nýggjum SÍF myndum verður eisini at síggja í høllini hendan dagin.

Tað verður ikki neyðugt at ganga svangur í høllini, tí matsøla verður alla tíðina, opið er.

At fáa verður: Pitabreyð við heimagjørdari fyllu, pizza, franskur hotdog, kaffi ella te við vaflum, sodavatn, góðgæti o.a.

# Fiskivinnustruktur og fría kapping

**Kaj Leo Johannesen**



Fiskivinnan er ein vinna, sum á ein ella annan hátt hevur ávirkan á føroyingar. Tað er ein stór og trupul uppgáva at samskipa okkara høvuðsvinnu, tí ávirkanin frá teimum ymisku áhugabólkunum er sera sterk. Tað krevur styrki og hegni at fáa alt at passa saman, soleiðis at Føroyar sum fiskivinnusamfelag, fáa sum mest burturúr tí avmarkaða tilfeinginum, á sjógvi og landi.

Merkingin av orðinum "fiskivinnupolitikkur", innan ES - Ísland og Norra o.s.fr., fevnir um alt, líka frá landgrunnunum og heilt til marknaðirnar. Hjá okkum hevur "fiskivinnupolitikkur" í stóran mun bert fevnt um skipaflotan.

Ynskiligt hevði verið, at havt ein fiskivinnustruktur ella politikk, sum røkkur líka frá fiskigrunnum til marknaðin. Tað er altíð lætt at hyggja í bakspeglið, men tað er fáur í vinnuni ídag, sum ikki er fegin um flestu broytingar innan høvuðsvinnu okkara, sum stóðust av kreppuni, men tað sum gjørt var í 92 og fram eftir vóru fyribils kreditorloysnir ella krepp uloysnir, sum framvegis eru galdandi.

Føroyska fiskivinnan var fram til kreppuna samansett eftir planbúskaparligum leisti, og má tað helst ásannast, at slíkur leistur er deyðadømdur í vesturheiminum í hesum tíðum.

Tað er komin ein nógv betur kapping innan okkara høvuðsvinnu, og eg meini, at vit eru mitt í eini, meir ella minni tilvitaðari prosess, sum endar við at fiskiídnaðurin innan stutta tíð aftur kemur á privatar hendir.

Spurningurin er, um vit ikki áttu at hugt at, hvussu langt er komið ávegis, og síðani hvat veruliga málið er, og hvussu vit náa tí.

Vit hava nátt eina rímiliga góða kapping innan útflutningi og framleiðslu av fiski, partvís við privatum og almennum feløgum, men sjálvandi um vit skulu gera okkum hugsingar um at tilvirka okkara rávøru meira, so krevur tað einki minni enn limaskap í ES, væl at merkja um vit skulu satsa uppá tann marknaðin í framtíðini.

Innan fiskiflotan meini eg, at vit eru komin ógvuliga stutt, sæð við liberalum eygum. Tað stendur í lógini, at fiskiríkidømi er ogn Føroya fólks. Hetta má antin endurskoðast, ella takast burtur úr lógini, tí í praksis er fiskiríkidømi ikki ogn Føroya fólks, um ikki landið hevur rætt at selja fiskidagar til hægstbjóðandi. Tað at oljuríkidømi er ogn Føroya fólks, sær ikki út til at verða nakar trupuleiki. Greiðar reglur eru um treytir at bjóða uppá eitt oljuloyvi, og eingin fær oljuloyvi, uttan eina av landinum ásetta samsýning. Eg havi ringt við at skilja munin ímillum at keypa loyvi at "fiska/bora eftir olju" og loyvi at "fiska fisk". Dagsvirðið av einari tunnu av ráolju er umleið 22 USD. Dagsvirðið av einar tunnu av ráfiski (toski) er umleið 250 USD.

Øll tosa vit um hetta undrið "frí kapping". Men tað vísir seg, sum rópt verður varskó, um hetta undrið skuldi rakt onkran, sum t.d. er vardur av einum tillutaðum fiskiloyvi, ella á annan hátt er vardur av eini, eftir mínari meining, ov gamlari planbúskaparligari skipan.

Hvør er munurin at løggeva at selja fiskidagar gjøgnum uppboðssølu, og at løggeva at selja fisk gjøgnum uppboðssølu? Eru fiskidagar ikki bara ein annar háttur at gera upp nøgd og virði av fiski uppá?

Síðani verður tosað um, at fólk hava ringt við at skilja, hví tað ikki er meira váðafúsur kapitalur, sum verður settur í høvuðsvinnuna. Spurningurin er, um tað letur seg gera at fáa váðafúsan kapital til fiskivinnuna, soleiðis sum hon nú er skipað.

Hevði høvið at hitta og hava eitt gott langt kjak við menninar, sum løgdu rygg til Caragata álitið. Teir høvdu lætt við at skilja manglandi áhugan í íløguhuginum hjá professjonellum íleggjarum, so leingi fiskivinnan ikki varð greiðari skipað millum privat og alment. Sum onkur hevur sagt er tað í veruleikanum ikki bara kunningardiskurin á flogvøllinum, sum er privatiseraður síðan 92?

Sum sagt, so áttu vit helst at gjørt okkum greitt, hvussu vit fáa fullført prosessina, sum vit eru mitt í, og fingið okkara høvuðsvinnu at virka undir vanligum fríum marknaðarkreftum. Men tað má og skal verða til gagns fyri tað føroyska samfelagið.